# Stongin út móti stongin inn

**VODAFONEDEILDIN** Eitt korter inn í seinna hálvleik stendur Súni Olsen klárar at taka brotsspark. HB hevur løtuna undan lagt seg á odda, men hetta er møguleikin hjá Víkingi at koma inn aftur í dystin. Sigandi fyri gongdina hjá báðum feløgunum í ár, so rakti Súni Olsen stongina – og út!

Tróndur Arge

| Lið | Mál |
|---|---|
| HB | 2 |
| Víkingur | 0 |



Tað var óvanliga lítið fólk í Gundadali í gjár, tá HB tók ímóti Víkingi. Liðini blivu ávíkavist nummar eitt og trý í fjør, men heldur ikki tað hjálpti uppá áhugan hjá fólkinum. HB-húsið sá mest sum bara hálvfult út. Ein orsøk kundi verið, at HM var í sjónvarpinum samstundis. Ein onnur, at bæði AB og B36 spældu samstundis, men tað hevur víst seg í ár, at áskoðararnir eru trekir at fáast við.

– Tá vit ikki skora, so gera vit tað torført fyri okkum sjálvar. Bæði í dag og í seinnu hálvfinaluni ímóti ÍF hava vit fleiri møguleikar, men taka ikki av. Eg haldi at vit spældu fult upp við HB og hevði hatta brotssparkið fari inn, so rokni eg við, at tað hevði koppað okkara veg, tí eg haldi at vit hava munin,



sigur Nicias Niclassen, liðskipari hjá Víkingi.

Tað hendi lítið og einki í fyrra hálvleiki. Hóast fleiri góð uppspøl, so gjørdist tað sjálvdan vandamikið frammanfyri málinum. Tó so, so høvdu liðini hvør sín stóra møguleika. Fyrsta varð Finnur Justinussen spældur leysur, men hann tók sær ov góða tíð og HB verjan fekk prika bóltinum frá honum, áðrenn hann fekk spælt bóltin tvørtur um tile in púra leysan viðleikara. Løtu seinni bjargaði Niclas Niclassen á strikuni, tá Milan Kulijc kom at standa prúa leysur frammanfyri málinum.

– Vit høvdu eitt verjukent útgangsstøði við einum áleypara, men tveimum skjótum vengrum. Tað riggaði væl, vit hildu teimum frá teimum stóru møguleikinum og fingu skapt onkrar sjálvir. Vit mangla∂u bara at skora í dag. Tað er torført at tosa um rættvísi í fótbólti, men eg haldi at vit hava uppiborið betri í dystinum í dag, sigur Niclas Niclassen.

## Tað er torført at tosa um rættvísi í fótbólti, men eg haldi vit hava betri uppiborið

NICLAS NICLASEN, VÍKINGUR

HB kom á odda tíðliga í seinna hálvleiki, tá Símun Samuelssen royndi seg við frísparki stutt uttanfyri brotssteigin. Geza Turi í Víkingamálinum tóktist hava tamarhald á støðuni, men brádliga tók bólturin í ein leikara og skifti kós. Geza Turi varð seldur og HB á odda. Lítla løtu seinni fekk Víkingur brotsspark, men tað er stong út hjá Víkingi fyri tíðina, og brotssparkið fór sama veg. Í tíðini sum dómarin hevði lagt aftrat, skoraði innskifti Levi Hanssen til endaliga úrslitið 2-0 til HB.

Gjøgnum allan dystin tóktist HB leggja stórt trýst á Súna Olsen og Nenad Stankovic á miðjuni hjá Víkingi. Serliga Nenad fekk harða viðferð til tíðir.

– Eg haldi tað ávirkar okkum so nógv. Teir spæla nærmast við fýra áleyparum og tí eru vit í yvirtal á miðjuni. Tað gevur okkum gott pláss at spæla í. At teir á heimavølli vejla at dekka tveir av okkara spælararum so tætt, tað vísur bara at teir hava viðring fyri okkum, sigur Niclas Niclassen.

HB liggur nú aftur fremst, eftir at NSÍ hevði yvirnátt á fyrsta plássinum eftir sigurin á FC Suðuroy leygardgin. Víkingur hevur nú tapt tríggjar teir seinastu dystirnar teir hava spælt. Tveir í landskappingini og ein í steypakappingini.

– Áðrenn kappingina høvdu vit eitt mál um at enda í millum trý tey fremstu, tað er framvegis málið hjá okkum. Kappingin er ikki hálvrunnin enn og vit fara ikki at kasta handklæði í ringin í juni mánað, sigur Niclas Niclassen at enda.

Bæði HB og Víkingur skulu spæla grannauppgerðir mikukvøldið. HB skal á Argir at spæla ímóti AB, meðan Víkingur fær vitjan av NSÍ, sum hevur vunnið eir seinastu sjey dystirnar og liggur á einum øðrum plássi.

*trondur@sosialurin.fo*

## Gleðin drívir verkið

### Andrew av Fløtum gjørdist í gjár 31-ára gamal og fleiri ferðir sungu tey »til lukku til tín« í HB-húsinum, meðan dysturin var í gongd

– Eg havi altíð spælt uppá gleði og tað vóni eg kann halda fram í eina tíð aftrat. Bóltførleikin fer nokk onganveg, men tað merkist sjálvandi at árini eru blivin fleiri. So leingi tað er stuttligt haldi eg fram og enn haldi eg tað er stuttligt, sigur Andrew av Fløtum.

HB hevur fleiri ferðir í ár skorað í evstu løtu og fingið fult í dystinum, sum HB leikliga ikki hevur verið omaná.

– Tað er ilt at siga hvar marginalarnir koma frá. Tað er rætt at nógv er koppað okkara veg í ár, men eg dugi ikki at siga um vit gera nakað serligt fyri at tað skal eydnast, sigur Andrew av Fløtum.

Dysturin í gjár var javnur og kundi koppað báðar vegir, men tá Víkingur fekk sín møguleika, tóku teir ikki av.

– Fyrri hálvleikur var javnur og tað var lítil ferð á dystinum. Teir dugdu væl at taka ferðina av spælinum hjá okkum. Í seinna hálvleiki sá tað betri út. Vit fingu ferð á spælið og komu longur niðan á vøllin. Tað hjálpti nógv, at vit fingu tað fyrsta málið, tí tað opnaði eisini dystin, sigur Andrew av Fløtum.

HB miðvøllurin ansaði væl eftir Súna Olsen og Nenad Stankovic hjá Víkingi.

– Súni og Nenad eru tveir av teirra bestu leikararum og vit valdu at leggja teir undir stórt trýst. Vit vildu heldur at teir sparkaðu langt, enn at uppspælið hjá teimum gekk gjøgnum Súna og Nenad, sum eru skapandi kreftirnar hjá Víkingi, sigur Andrew av Fløtum.

Málið hjá HB fyri kappingina í ár er greitt.

– Síðani vit taptu í steypakappingini, hava vit bara havt eitt at fara eftir og tað er landskappingin. Tað er sjálvandi málið at vinna hana í ár og vit liggja eisini fremst í løtuni. Vónandi klára vit at halda tað til kappingin er liðug, sigur Andrew at enda.